gult4 cyan4 magenta4 svart4



## Hovbingar undir kloakk

**– Bygdarráðið í Hovi hevur hevur nú sett sær fyri at gera kloakkirnar í bygdini lidnar**

UMHVØRVIS-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

Nú skulu kloakkirnar í Hovi gerast lidnar.

Tað samtykti bygdarráðið á fundi leygardagin.

Í einum parti av bygdini, eru kloakkirnar lagdar av nýggjum, men enn er ein stórur partur eftir. Tað er allur tann uttari parturin í bygdini, frá kirkjuni og úteftir, har kloakkirnar enn ikki eru lagdar. Samstundis eru tað framvegis einstøk hús, sum ikki enn hava fingið rottanga.

Bygdarráðið í Hovi hevur nú sett sær fyri at fáa hesi viðurskiftini í rættlag.

Bygdarráðið samtykti at fáa arbeiðið projekterað at leggja nýggja kloakk í tí partinum av bygdini, sum er eftir. Samstundis skal arbeiðið kostnaðarmetast.

Hov er ikki av peningasterkastu kommununum, so tað verður ikki talan um at gera arbeiðið í einum. Tí er neyðugt at toyggja arbeiðið yvir nøkur ár, men ætlanin er so at fáa gongd á arbeiðið aftur.

Samstundis fáa tey húski, sum framvegis ikki hava rottanga, bræv frá kommununi við boðum um at fáa hetta í rættlag nú.

Kommunan hevur áður álagt teimum at fáa sær rottanga, men tað hevur ikki hjálpt. Men nú fáa tey boð um at fáa rottanga til húsini.

Bygdarráðið vísur á, at eftir lógini skulu øll hús verða bundin í kloakk í seinasta lagi í 2010.

# Hovbingar halda fast um studentaskúlan

**Nú ætlanin er at byggja nýggjan studentaskúla í Vági, minnir Hovs Kommuna á, at Løgtingið hevur samtykt, at skúlin skal byggjast í Hovi**

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*



*– Bygdarráðið í Hovi minnir á, at Løgtingið hevur samtykt at byggja nýggja studentaskúla í Hovi. Á bygdarráðsfundi leygardagin varð samtykt at mómæla, at skúlin nú skal byggjast í Vági. Á myndini eru bygdarráðslimirnir fremst frá vinstru, Dagfríð Hovgaard og Jákup Petur Joensen, varaborgarstjóri. Við hansara borðendan situr Emma Petersen, borgarstjóri og høgrumegin situr Alexius Midjord. Við nærmasta borðendan er tað Delmar Tausen, sum er fimti bygdarráðslimurin. Við ryggurin til, við telduna, situr Hildur Gunnarsdóttir, kommunuskrivari*

Tann nýggi studentakúlin í Suðuroynni, skal byggjast í Hovi.

Tað heldur Hovs Kommuna fast um.

Nú tað er komið fram, at ætlanin er at byggja nýggjan studentaskúla í Vági, hevur bygdarráðið í Hovi gjørt vart við seg.

Bygdarráðið fer nú at senda Torbjørn Jacobsen, landsstýrismanni í skúlamálum, bræv, har tað verður mótmælt at skúlin uttan víðari verður bygdur í Vági.

Og Hovs Kommuna heldur seg hava eina góða sak.

Føroya Løgting hevur nevniliga samtykt, at nýggjur studentaskúli skal byggjast í Hovi.

Tað var einaferð í áttatiárunum, at Løgtingið samtykti ein skúlapakka. Og ein partur av honum var, at í Suðuroy skuldi ein nýggjur studentaskúli byggjast í Hovi.

Hetta var ein salomonsk loysn, tí í fleiri ár hevði ósemja verið ímillum Vág og Tvøroyri um, hvar í oynni, skúlin skuldi vera.

Tað endaði so við, at Løgtingið samdust um eina millumloysn, og tað var at byggja skúlan í Hovi.

Á bygdarráðsfundi í Hovi leygardagin samtykti bygdarráðið at minna landsstýrismannin í skúlamálum á hesa løgtingssamtyktina um at byggja skúlan í Hovi.

Víst verður eisini á, at tá ið samtyktin varð gjørd, varð eisini økið lagt av til endamálið.

Hetta økið er framvegis tókt til endamálið.

### Savna, heldur enn spjaða

Í viðgerðini í bygdarráðnum í Hovi, kom fram, at bygdarráðslimir skiltu ikki, hví skúlin skuldi byggjast í Vági.

– Imeðan hetta landsstýrið hevur sitið, hevur verið talan um at byggja tveir skúlar í Suðuroynni. Annar skúlin, tað er almanna- og heilsuskúlin, skal verða á Tvøroyri og hin skúlin, tað er studentaskúlin, skal byggjast í Vági.

– Hetta er beint øvugt ímóti almenna politikkinum annars, tí alla aðrastaðni í Føroyum verður roynt at savna skúlarnar í deplar fyri at spara í rakstri við tað, at allir skúlarnir í deplinum í ein vissan mun fáa nyttu av somu lærarum, skrivstovufólki og útgerð, ístaðin fyri at hava tvey av øllum.

Víst verður m.a. til skúldepilin í Kambsdali.

Bygdaráðið vísir eisini á, at tingið stutt síðani feldi eitt uppskot um at byggja studentaskúlan í Hoydølum út, tí at ein skúladepil skal gerast í Marknagili og at tað var bíligari og betri upp á seg.

Tí heldur bygdarráðið í Hovi, at tað er lítið skilagott at spjaða skúlarnar í Suðuroynni.

– Tá ið fyrimunurin er so stórur at leggja skúlar í deplar aðrastaðni í Føroyum, má tað saman verða galdandi í Suðuroynni, sigur bygdarráðið.

Tí mælir bygdarráðið til at skúlarnir í Suðuroynni eisini verða savnaðir í ein depil - og at hesin skúladepilin verður í Hovi.

– Ongastaðni í oynni koma skúlarnir at liggja so væl fyri, sum júst Hovi, tí tað er at kalla púra mitt í Suðuroynni.

– Tað eru ikki meiri enn 20 minuttir at koyra úr syðstu bygdini, Sumba, til Hovs. Og tá ið ætlaða bergholið ímillum Øravík og Hov er gjørt um nøkur heilt fá ár, er tað heldur ikki meiri enn 20 minuttir at koyra úr norðastu bygdini, Sandvík, til Hovs.

Somuleiðis ger bygdarráðið vart við, at Suðuroyggin er annað enn Vágur og Tvøroyri.

– Tað eru eisini aðrar bygdir í oynni og tað kundi havt ómetaligan týdning fyri eina bygd sum Hov, sum hon, t.d. varð gjørd til ein skúlamiðdepil í Suðuroynni.

# Løgtingið flutt skúlan til Vágs

– Tað er ein misskiljing, at løgtingssamtyktin um at nýggi studentaskúlin skal vera í Vági.

Tað sigur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum.

Tað er rætt, at Løgtingið einaferð í áttatiárunum samtykti,at skúlin skuldi byggjast í Hovi, soleiðis sum bygdarráðið sigur í greinini omanfyri. Men tann samtyktin varð broytt fyri umleið einum mánaða síðani. Sostatt hevur løgtingið nú samtykt, at skúlin skal verða í Vági, sigur landsstýrismaðurin.

Sum tað eisini sæst í greinini omanfyri, heldur Hovs Kommuna, at tað er løgið, at skúlarnir í Suðuroynni skulu spjaðast um, tá ið tað alla aðrastaðni í Føroyum verður hildið at vera ein fyrimunur at savna skúlarnar í deplar.

Hesum er Torbjørn Jacobsen ikki samdur í.

– Í Suðuroy eru tveir skúlar, sum eru á hægri støði enn framhaldsdeildin, almanna- og heilsuskúlin og miðnámsskúlin. Hetta eru hvør sín skúli. Almanna- og heilsuskúlin er á Tvøroyri, tí hann má vera tætt við eitt sjúkrahús. Studentaskúlin hevur verið í Vági í so nógv ár, at tað er trupult at flyta hann nú. Harafturat er syðra helvt í Suðuroynni tað kið í landinum, sum enn er harðast rakt av kreppuni og tað kann verða ein styrkur fyri økið at fáa ein skúla í býin, heldur landsstýrismaðurin.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Sluppu við skelkinum

**Tíðliga mikumorgunin fór ein bilur útav á vegnum oman til Vestmanna. Ov nógv ferð er eftir øllum at døma orsøkin til óhappið. Tríggir ungir menn vóru í bilinum, og eingin teirra er í lívsvanda**

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*



*Illa farni bilurin, sum fór útav vegnum tíðliga mikumorgunin. Tíbetur fór hann ikki útav vegnum við kós móti havninum, men brast í bergið innanfyri*
*Mynd: Jens Kr. Vang.*

Tað kundi enda heilt galið, tá ein grønur Peugeot 406 fór útav vegnum niðanfyri Vestmanna mikumorgunin klokkan 5.15.

Bilurin, sum var á veg til Vestmanna, hevði ov nógva ferð, tá hann fór inn í eitt høgrasving. Førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum brast inn í bergið innanfyri vegin. Bilurin er sera illa farin og gjørdist vrak.

Um hugt verður eftir sporunum í vegnum, misti førarin tamarhaldið eini 120 metrar frá staðnum, har afturendin á bilinum brast í veggin. Síðani ferðaðist bilurin eini 30 metrar í veitini, sum er millum vegin og bergið.

Bilurin kundi eins væl farið útav vegnum vinstrumegin og bólta fleiri hundra metrar niður í havið.

Sýslumaðurin í Vestmanna, Ivan Klein Olsen, sigur, at tíbetur fór bilurin í bergið og ikki útav hinumegin, tí so kundi ferðsluóhappið verið nógv álvarsamari. Hann veit enn ikki, um menninir sótu í trygdarbelti, men so skjótt teir verða útskrivaðir av landssjúkrahúsinum, verða teir avhoyrdir av løgregluni.

Tað var ein maður í Vestmanna, sum av tilvild sá tilburðin úr húsi sínum, ið boðaði løgregluni frá óhappinum.

Peugeot 406 er ein kraftmikil bilur, hvørs motorur vanliga hevur umleið 2000 kubik við eini 130 hestakreftum. Men er talan um ein Peugeot 406 TS6 hevur hann umleið 3000 kubik og eini 200 hestakreftir. Tað er í øllum førum talan um ein bil í tí stóra klassanum, sum kann koyra skjótt.

# Fólkatalið veksur

**Í løtuni búgva 46.339 fólk í Føroyum, og tað er ein vøkstur uppá sløk túsund menniskju seinasta árið. So nógv fólk hava ikki búð her síðani 1992, tá fólkatalið var 46.821**

FÓLKATAL
*Stefan í Skorini*



*Fólkatalið í Føroyum øktist við 144 fólkum fyrstu tveir mánaðirnar í ár*

Fólkatalið í Føroyum økist við rúkandi ferð. Seinastu hagtølini vísa, at vit eru við at nærkast sama fólkatalinum, vit høvdu undan kreppuni. Bara tveir teir fyrstu mánaðirnar í ár øktist fólkatalið við 144 fólkum.

Seinasta uppgerðin, sum er gjørd 28. februar í ár, vísir, at 46.339 fólk búleikast í Føroyum. Somu tíð í fjør var talið 45.515, og sostatt ber til at staðfesta ein vøkstur uppá 824 fólk seinastu tólv mánaðirnar.

Hetta stendur at lesa í Hagtíðindum, sum Hagstovan hevur latið úr hondum.

Hagtølini yvir fólkatalið ganga aftur til 1970, og vøksturin hevur hetta tíðarskeiðið ongantíð verið so stórur í einum ári. Í 1975 var fólkavøksturin 792, og í 1988 var vøksturin 722 fólk.

Hægsta fólkatalið, sum hevur verið í Føroyum, er 47.838. Tað var í 1989. Síðani lækkaði talið fram til 1996, tá tað aftur fór at ganga rætta vegin.

### Tilflytingin metstór

At tað eru uppgangstíðir í Føroyum, og at fólk fegin vilja flyta aftur til Føroyar merkist týðiliga í fólkatalinum.

Nettoflytingin er eisini metstór. Í fjør fluttu 1787 fólk til Føroyar, meðan 1350 fluttu av landinum, og tað gevur eina nettoflyting uppá 437 fólk. Nettoflytingin hevur sambært hagtølunum heldur ongantíð verið so stór sum í fjør.

Burðaravlopið í ár 2000 var 346 fólk, meðan tað 225 í 1999. 708 vórðu fødd, meðan 362 doyðu í fjør.

# Havnin veksur skjótast

**Tórshavnarøkið er nógv tað fólkaríkasta økið í landinum. 28. februar í ár búðu 17.830 fólk í Tórshavnar kommunu, men tá er Kollafjørður tikin við**

FÓLKATAL
*Stefan í Skorini*

Fyrstu tveir mánaðirnar í ár vaks fólkatalið í Tórshavnar kommunu við 87 fólkum. Tilflytingin var 40 fólk, meðan burðaravlopið var 87.

Tann 1. januar í ár kom Kollafjarðar kommuna við í Tórshavnar kommunu, og tí var eitt lop í fólkatalinum uppá góð 1.000 fólk, tá kollfirðingar verða roknaðir við í størstu kommunu í landinum. Við árslok í fjør vóru 16.787 havnafólk, men nú er talið komið uppá 17.830 fólk.

Fólkatalið í høvuðsstaðnum hevur annars verið í støðugum vøkstri síðan miðskeiðis í 90-unum. Við árslok í 1996 var talið 15.560 fólk, og hvørt ár eru nøkur hundrað løgst afturat. Frá árslokið í 1996 til árslok í fjør var vøksturin 1227 fólk.

### Onnur øki standa í stað

Meðan miðstaðarøkið upplivir ein stóran vøkstur, er hesin ikki eins eyðsýndur aðrastaðni í landinum. Í nøkrum økjum minkar fólkatalið, meðan vøksturin er lítil í teimum flestu støðunum.

Í syðra parti av Eysturoynni, sum telur Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar, Sjóar og Skála kommunu, búgva nú 8.689 fólk. Vøksturin seinastu fimm árini hevur verið 794 fólk.

Einki annað økið í Føroyum kann reypa sær av nøkrum serliga stórum vøkstri í fólkatalinum.

Í Klaksvíkar og Hvannasunds kommunu búgva 5.219 fólk, og tað er ein vøkstur uppá 273 fólk seinastu fimm árini. Í Suðuroynni búgva 4.985 fólk, og tað er ein minking uppá 108 fólk seinastu fimm árini.

Í Vágunum búgva 2.658 fólk, meðan 1.453 fólk búleikast á Sandoynni, og har hevur fólkatalið mestsum staðið í stað seinastu árini.


LIFEBOOK FARTELDA



FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

C4345, Intel Celeron 650 MHz, 12,1" TFT SVGA display, 64 MB SDRAM, max 320 MB, 6 GB hard-disk, CD-drev og Floppy-drev, 56K V.90 modem, Mobile Security, 3 kg., Windows 98 við Word2000 og Works2000, 1 ára garanti.

**Kr. 15.395,-**

Eyka RAM er á goymslu

**FÍGGING:** Útgjald: **5.132,-**
Rest yvir 12 mðr.: **953 um. mðn.**
Rest yvir 18 mðr.: **660 um. mðn.**



3arin ELECTRONIC

*SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo*